# At traðka liggjandi fólk

**JÓNLEIF JOHANNESEN**
Klaksvík



Sparingar skulu gerast hjá Strandferðsluni.
Jóhan Dahl sær tveir møguleikar.
**1.** At lække túratalið og harvið gera umstøðurnar verri hjá teimum, sum í verandi løtu hava tað vánaligasta sambandi til høvuðsstaðin.
**2.** At økja kostnaðin hjá teimum, sum í dag gjalda mest fyri at koma til høvuðsstaðin.
Hetta er at traðka liggjandi fólk, tí aðrir møguleikar eru at finna.

**Á fleiri herðum**

Í dag gjalda allir føroyingar fyri at koma til Havnar. Allir uttan teir, sum búgva á risunum báðum, Eysturoynni og Streymoynni. Hesar oyggjar sleppa undan at rinda fyri sínar vælútbygdu ferðamøguleikar. Góðir breiðir vegir, lýsandi tunnlar og nýumvalda brúgv. Tað er eingin ivi í mínum huga. Vit eiga nógv heldur at taka eitt tunnulsgjald frá hesum økjum, enn at pína og kroysta lívið úr útjaðaranum í Føroyum.
Vit kundu gjørt eina samhaldsfasta skipan, sum umfataði alt ferðslukervið í Føroym, tað veri seg á landi, undir landi og á sjónum. Tann berandi tankin er at vit tá verða fleiri, sum lyfta. Hendan skipan átti at fevnt um tunnilgjøld og ferðagjald við ferðamannaskipum. Ein slík skipan hevði gjørt tað møguligt at skrúva fleiri knøttar samstundis og harvið gjørt at tað ikki var neyðugt at skrúva knøttarnar so langt. Eisini hevði tað javntstilla fleiri økir í Føroyum.

**Skipani í samband við ferðslukervið**

Hetta kann gerast við at knýta Norðoya, Vága, Norðskála og Kollfjarða tunlarnar saman við ferðamannaskipaunum. Alt í eina skipan. Skipanin skal virka á tann hátt, at bilurin bert verður skrásettur einaferð um dagin. T.v.s. at tað kostar tað sama at koyra gjøgnum allar tunlarnar, sum tað kostar at koyra gjøgnum ein og hevur tú goldið í einum tunnli, er ferðabáturin ókeypis. Hinvegin eru tunlarnir ókeypis, um tú hevur goldið umborð.
Hendan skipan hevði til einkis gjørt trupulleikan hjá Jóhan Dahl so dyggiliga.
Tað er mær ein gáta at landsins kostnu ikki síggja hendan møguleikan, men áhaldandi traðka liggjandi fólk.

# Grugg flytir fokus!

**ANDREA HEINDRIKS-DÓTTIR**
forkvinna í skúlastýrinum fyri Tórshavnar Kommunuskúla



Tað hevur verið alment frammi, at eyka kostnaður, áljóðandi 25 milliónir krónur, skal brúkast til Tórshavnar Kommunuskúla, um 10. flokkur verður í skúlanum komandi ár.
Hetta er beinleiðis skeivt – ja, ein villleiðing!
Umleið 80, 10. floksnæmingar eru í løtuni í Tórshavnar Kommunuskúla, og tað kostar ikki eina einastu krónu eyka framhaldandi at hava hetta talið – svarandi til helvtina av 10. floksnæmingum í kommununi – í Tórshavnar Kommunuskúla komandi skúlaár.
Fyri nøkrum mánaðum síðani vóru umboð úr Tórshavnar Býráði, arkitekti og umboð fyri fyrisitingina í býráðnum á vitjan í Kommunuskúlanum, har tey løgdu eina heildarætlan fram viðvíkjandi Tórshavnar Kommunuskúla.
Heildarætlanin umfatar m.a. umvæling og umbygging av sethúsunum við Tróndargøtu til 4.,5. og 6. flokk at húsast í, og umvælingar og umbyggingar á stóra gula høvuðsbygningin, varð upplýst á hesum fundinum. Fyrri bygningurin er 93 ára gamal, seinni 53 ára gamal og eru báðir sum øllum kunnugt sambært byggifrøðingum í sera vánaligum standi. Tí er tað ikki rætt at siga, at 10. flokkur hevur nakað sum helst við hesa neyðugu umvælingarætlan at gera. Øll vita, at skúlin er fongdur við soppi og er fyribilsviðgjørdur, men hetta skal sjálvandi fáast í rættlag undir øllum umstøðum.
Tað er frá kommununar síðu lagt upp til at føra hesa heildarætlan út í lívið yvir eitt áramálsskeið uppá 4-5 ár. Hetta er ein ætlan, sum má setast í verk – skuldi helst langt síðani verið sett í verk - og hevur als einki samband við 10. flokk, um 10. flokkur er á skúlanum ella ikki!
Tórshavnar Kommunuskúli hevur eina framúr góða 10. floksskipan, sum leiðsla og starvsfólk skúlans hava ment seinastu umleið 4 árini. Hetta er ein sólskinssøga, og eigur Tórshavnar kommuna heldur at breggja sær av at hava ein skúla sum veruliga hevur ment eitt 10.floks tilboð sum næmingar, foreldur og lærarar eru glað fyri.
Tað er hugstoytt, at ístaðin fyri gleði og stoltleika er hetta vorðið ein kleppur um beinini hjá kommununi, og býráðspolitikkarar eru enntá farnir so langt sum at seta umbygging av Kommunuskúlanum upp ímóti ellisheimi yviri við Strond. Tílíkt eigur ikki at koma fyri í einum siðmentaðum samfelagi – vit skriva 2009 !
Vænti og vóni, at umrøðan av hesum máli, verður vend aftur á beint, so ein verulig viðgerð kann fara fram, á sakligum grundarlagi til gagns fyri allar partar.

# Almennur peningur

**HERI MOHR**
Á oasuni 'Hvíldarheimið Naina', vikur 44/45, 2009



Í Dimmalætting 11. í h. mð. skrivaði Tórbjørn Jacobsen m.a. »Vit hildu lítið um politiska maktloysi, ABC-samgongan hevur sýnt, tá ið hon avreiddi dønum Íleggingargrunnin. Tá ið nú hetta var hent, so valdu vit ta pragmatisku loysnina at mæla til at útbyggja við realisering av tí niðurlagda grunninum.«
Hetta lítla brotið úr drúgvari grein ber boð um, at greinskrivarin antin ikki er nóg væl informeraður um Íleggingargrunnin fyri Føroyar, ella at hann við fullum vilja skrivar villleiðandi og ósatt.
Um greinskrivarin við hesum vil kunngera, at Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, sum í 45 ár hevur verið tann fíggjarliga mønin í almennari útbygging av Føroyum, er avreiddur dønum og niðurlagdur, er okkurt vindandi skeivt, sum vanlig fólk als ikki kunnu skilja.
Fyri at hjálpa fólki (og greinskrivaranum) aftur á beint, fer undirritaði við hesum at geva fylgjandi stuttu frágreiðing um Íleggingargrunnin fyri Føroyar:
Tann 28. januar 1964 viðtók Fólkatingið at seta á stovn Íleggingargrunn fyri Føroyar (Investeringsfond for Færøerne). Í nøkur ár játtaði Fólkatingið milliónir til grunnin soleiðis, at stovnsfæið kom upp á 140 milliónir.
Endamálið við hesum grunni var í fyrsta lagi at »yde lån til investeringer, navnlig i større offentlige anlæg og lignende, som må anses påkrævede eller ønskelige af hensyn til det færøske erhvervslivs udvikling….«
Grunnurin var tey fyrstu mongu árini umsitin av forsætismálaráðnum, áðrenn hann fyri uml. 30 árum síðani var fluttur til Føroya.
Handanin og móttøkan av grunnsins skjølum, dokumentum og tøkum peningi í 100-milliónatali fór fram á landsskrivstovuni í Tinganesi við fólkum frá forsætismálaraðnum øðrumegin og einum fulltrúa á landsskrivstovuni og roknskaparstjóranum á Føroya Gjaldstovu hinumegin. Alt varð kannað og talt upp og kvittað frá báðum síðum. Dagin eftir fóru fulltrúin, roknskaparstjórin og embætisfólkið frá forsætismálaraðnum sightseeing til Fuglafjarðar.
Á Føroya Gjaldstovu varð beinanvegin rakstrar- og fíggjarroknskapur etableraður. Ein 5-manna nevnd við formanni sum grunnsins hægsti myndugleiki, í samsvar við fólkatingslógina frá 1964, varð vald av landsstýrinum. Nevndin skal avgreiða grunsins ársroknskapir landsstýrinum til góðkenningar, og landsstýrið skal senda roknskapin forsætismálaráðnum til kunningar.
Í hesi mongu ár hevur Íleggingargrunnurin fyri Føroyar havt ein sera avgerandi leiklut í tí almennu útbyggingini av Føroyum: Nýggir landsvegir, nýggj berghol, útbygging av SEV, bjarging av Atlantic Airways undan húsagangi, bankakreppan 1992/93 o.s.fr.
Vit eiga ikki at gloyma, at í árunum 1948-1992 átti løgtingið 10-tals grunnar við milliardavirðum: Vinnulánsgrunnurin, grunnurin til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum, veðhaldsgrunnurin, oljugrunnurin, upphøggingargrunnurin, landskassaútlán o.s.fr. Allir hesir grunnar eru so syndarliga farnir í søguna. Og »heimsins mest framkomni« veiðifloti, kemikaliuskip, frystiog farmaskip, í stóran mun fíggjað úr grunnum og landskassanum, hvurvu øll sum kavi fyri sól. Milliardir av almennum peningi hvurvu. Úr hesum ragnarøkum osar enn dagin í dag!
Vit føroyingar mugu vera takksamir fyri, at tað ikki eydnaðist loysingarfólki á løgtinginum at fáa kvørkratak um Íleggingargrunnin fyri Føroyar, á sama hátt sum tey nú í 8 ár hava hildið um kvørkrarnar á blokkstuðlinum úr ríkiskassanum.
Men tað, sum órógvar sálarfriðin meira enn nakað, er, at hesir somu landspolitikkarar áhaldandi tala og skriva villleiðandi og ósatt um vitalar tilveruspurningar. Hvussu kunnu vit kenna okkum trygg undir slíkum krypilskendum, mentalum viðurskiftum?
Tað, sum her er skrivað, loysir ikki gátuna: Hvussu kann ein ABC-samgonga avreiða dønum ein danskan grunn? Og hvussu kann ein niðurlagdur grunnur í komandi tvey ár fíggja útbygging av flogvøllinum í Vágum við hundrað-tals milliónum?
Áhaldandi politiskur sálarkuldi seta djúp, greflig spor í okkara lítla samfelag.
Føroya søga hevur annað uppiborið.
Ella verður tað kanska søgan um »Die Commedie einer Tragedie«, sum okkara eftirkomarar skulu minnast og goyma so væl?

# Bert til undirhald?

**TRYGVI F. GUTTESEN**



Eg má hava rakt eitt eymt punkt hjá Jóannes Eidesgaard, síðan hann velur at vevja alt upp í ein ellubita.
Jóannes Eidesgaard viðgongur tó, at hann og hansara flokkur brúka ikki nógva tíð upp á okkara ríkisrættarligu støðu, tað málið hevur als ikki nakran sum helst týdning fyri Javnaðarfloksins støðu beint nú. Spurningurin um samríki ella loysing er nakað, sum Tjóðveldi og Sambandsflokkurin kunnu undirhalda við, vit hava onnur og munandi meira týdningarmikil mál at viðgera.
Jóannes Eidesgaard skrivar eisini, at spurningurin um samríki ella loysing er eitt meira enn 100 ára gamalt klandursmál. Ja, har eru vit púra samdir, men hví ikki gera nakað við tað klandrið ?
Eg og ivaleyst mong við mær hava sæð fram til, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin í sátt og semju tóku burtur hetta keðiliga og møðandi klandursmál við eini fólkaatkvøðu, men tað verður helst av ongum, so leingi Javnaðarflokkurin framhaldandi hevur so lítlan áhuga í hesum týðandi máli.